## Inngangur

Í løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., er ásett í § 6, stk. 2, at "*kommunurnar kunnu seta á stovn eldraráð í økinum, sum verða tikin við upp á ráð, tá avgerðir og umskipanir innan økið skulu fremjast*".

Vísandi til hesa lógarheimild hevur Klaksvíkar býráð í tíðarskeiðnum frá 1. mars 2012 til 31. desember 2016 roynt skipanina við einum eldraráð fyri Klaksvíkar kommunu.

Royndarskipanin er nú eftirmett, og eru kommunurnar í Norðoyggjum í hesum sambandi samdar um at skipa eitt felags eldraráð fyri allar Norðoyggjar, svarandi til tað økið, sum Norðoya Bú- og Heimatænasta (NBH) fevnir um og varðar av.

Frá og við 1. januar 2017, tá ið fyrsta felags eldraráðið fyri Norðoyggjar tekur við, verða kommunurnar í økinum hesar: Fugloyar kommuna, Viðareiðis kommuna, Hvannasunds kommuna, Kunoyar kommuna og Klaksvíkar kommuna.

## § 1 - Endamál

Eldraráðið er ráðgevi hjá Norðoya Bú- og Heimatænastu (NBH) og fær í lag samskifti millum eldru borgarnar og NBH.

Stk. 2

Eldraráðið verður kunnað um tiltøk, sum hava týdning fyri tey eldru, og eigur at samarbeiða við NBH fyri at tryggja, at atlit verður tikið til ynski og tørv hjá teimum eldru.

Stk. 3

Eldraráðið skal koma við hugskotum og virka fyri, at vitan og royndir hjá teimum eldru verða virðismett og gagnnýtt.

## § 2 - Heimild

Eldraráðið veitir NBH ráð í eldrapolitiskum spurningum og virkar sum ein samskiftisstovnur millum borgarar og NBH í sambandi við tilrættalegging av eldrapolitikkinum.

Stk. 2

NBH eigur at spyrja Eldraráðið um tað, sum viðvíkur teimum eldru.

Stk. 3

Eldraráðið kann av sínum eintingum siga NBH sína hugsan um eitthvørt evni av almennum slag.

**§ 3 - Starvsháttur Eldraráðsins**

Eldraráðið skal kunna seg um ynski og tørv teirra gomlu og um viðurskifti á eldraøkinum.

Stk. 2

Eldraráðið skal virka fyri áhaldandi kunning til tey eldru um broytingar og nýskapan á eldraøkinum.

Stk. 3

Eldraráðið skal halda fast um og útbyggja samskiftið við NBH gjøgnum framhaldandi meting av tiltøkum á eldraøkinum, og harvið menna og tillaga tey samsvarandi samfelagsmenningini.

**§ 4 - Eldraráðsins samanseting**

Íbúgvarnir í hvørjari kommunu velja síni umboð í Eldraráðið (eins og NBH-stýrið), har hvør kommuna fær eitt umboð fyri hvørjar byrjaðar 1000 íbúgvar.

Stk. 1

Tey næstvaldu á viðkomandi vallistum verða varalimir eftir galdandi valreglum.

Stk. 2

Valskeiðið er 4 ár.

Stk. 3

Limur í ráðnum kann frítakast fyri limaskap eftir áheitan. Avgerð, um limur verður frítikin, tekur Eldraráðið.

Stk. 4

Um ein limur í valskeiðnum missir valbæri, doyr ella verður frítikin samb. § 4 stk. 4, kemur varalimur inn tí raðfylgju, teir eru valdir.

Stk. 5

Er eingin varalimur á listanum at seta ístaðin, verður spurningurin um eykaval tikin upp við viðkomandi kommunu.

**§ 5 - Val til Eldraráðið**

Val til Eldraráðið er 4. hvørt ár í samband við kommunustýrisvalið.

Stk. 2

Valbæri og atkvøðurætt hava allir borgarar í viðkomandi kommunu, sum valdagin hava fylt 60 ár.

Stk. 3

Valevni, sum ynskja at stilla upp, geva skrivlig boð um hetta í seinasta lagi 4 vikur, áðrenn valið verður hildið. Saman við valevnisfráboðanini eigur at fylgja undirskrift hjá minst 2 stillarum, sum lúka treytirnar fyri valrætti til Eldraráðið.

Oyðubløð til uppstilling av valevnum eru at fáa á www.nbh.fo og við at venda sær til NBH.

Stk. 4

Bara valevni, sum rættstundis hava boðað frá, og sum rættstundis hava sent inn stillaralista, kunnu verða uppstillað.

Stk. 5

Reglurnar um val til eldraráð – herundir freistir, vallistar, atkvøðugreiðslu, brævatkvøður, kunngerð og uppgerð av valinum, klagur um valið v.m. – verða annars at fylgja teimum til eina og hvørja tíð galdandi reglum og mannagongdum fyri val av kommunustýri.

**§ 6 - Stovnan og arbeiðsháttur**

Eldraráðið skipar seg við formanni, næstformanni, kassameistara og skrivara á fyrsta fundi eftir valið.

Stk. 2

Eldraráðið ásetir sjálvt fundarskrá sína, hvussu ofta fundir skulu vera, reglur fyri dagskrá, fundarinnkalling og ráðsins arbeiðshátt.

Stk. 3

Dagsskrá og fundarfrásøgn skal sendast til leiðsluna fyri NBH. Fundarfrásøgnin er almenn við virðing fyri tagnarskylduni.

Stk. 4

Tað er sjálvboðið at vera limur í Eldraráðnum. Samsýning verður ikki latin, men limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum.

Stk. 5

NBH setir eina upphædd á fíggjarætlanina til Eldraráðsins virksemi.

Stk. 6

NBH veitir Eldraráðnum skrivstovuhøli, fundarhøli og skrivarahjálp til 4 árligar fundir.

**§ 7 - Gildiskoma/ Íverksetan**

Viðtøkurnar koma í gildi, tá ið tær eru samtyktar av stýrinum fyri NBH.

**§ 8 - Broytingar í viðtøkunum**

Eldraráðið, ella ein meiriluti, kann koma við uppskoti til stýrið fyri NBH um broytingar í viðtøkunum.

Stk. 2

Limakommunur og NBH kunnu koma við uppskoti til broytingar í viðtøkunum.

Stk. 3

Broytingar í viðtøkunum koma í gildi, tá tær eru samtyktar í stýrinum fyri NBH.

**§ 9 - Um at taka Eldraráðið av**

Stýrið fyri NBH kann til eina og hvørja tíð gera av, at Eldraráðið verður tikið av. Áðrenn tílíka avgerð verður málið í góðari tíð frammanundan lagt fyri Eldraráðið til ummælis.

Stk. 2

Verður Eldraráðið tikið av, fella allar møguligar ognir v.m. til NBH.

Soleiðis samtykt á fundi í stýrinum fyri Norðoya Bú- og Heimatænastu 6. oktober 2016.

Jógvan Skorheim, stýrisformaður